# The Dreams sláa ígjøgnum í Fraklandi

**Føroyska flaggið skal veittra um allan heim saman við The Dreams og túsundtals fjepparum. Og fyrsta stigið er Frankaríki, sigur ChiefOne, umboðsmaður hjá The Dreams**

TÓNLEIKUR
*Barbara Holm*
*barbara@sosialurin.fo*

Eftir samráðingar í seks mánaðir eydnaðist tað fríggjakvøldið føroyska rokkbólkinum, The Dreams, at skriva undir ein fløgusáttmála við eitt tað størsta plátufelagið í Fraklandi, »Fenetary«, sum er eitt dóttirfelag hjá Sony.

Hetta er eitt altjóð gjøgnumbrot hjá føroyska rokkbólkinum við teimum fýra púra vanligu føroyingunum. Teir tóku fyrst Danmark – og er møguleikin í Fraklandi nú altjóða gjøgnumbrotið hjá bólkinum.

### Leiðin gongur til París

Føroyski bólkurin veruliga gjørt seg merktan í Danmark og eru nú at kalla størsta rokknavnið í Danmark. Við túsundtals fjepparum hava teir framført heilar 60 ferðir í Danmark í ár, og hetta er uttan iva nakað, ið bert ber til fyri tey heilt størstu innan tónleikavinnuna.

Men sambært umboðsmanninum hjá The Dreams, ChiefOne, var Danmark bert fyrsta stigið á leiðini.

- Tað hevur alla tíðina verið ætlanin, at The Dreams skuldu gerast kendir á øðrum pallum enn Danmark, og fyri okkum hevur Danmark mest sum verið ein venjingarpallur, sigur hann.

Í seks mánaðir hava samráðingar verið ímillum The Dreams og fløgufelagið í Fraklandi, og loksins eydnaðist tað føroyingunum, at fáa sáttmálan undirskrivaðan.

Fyrsta stigið á leiðini verður ein stór framførsla í París í summar.



### Púra ovfarnir føroyingar

Fyri stuttum blivu The Dreams kosnir at verða tann bólkurin, ið hevði størstan møguleika at sláa í gjøgnum í Fraklandi, av fleiri stórum rokkbløðum og ummælarum.

Hóast hetta, so vóru dreingirnir í The Dreams púra ovfarnir tá teir fingu boðini.

- Eg skilti als ikki hvat var hent, tá ið umboðsmaðurin hjá okkum greiddi okkum frá, at tað umsíðir var eydnast okkum at fáa sáttmálan. Hetta er ótrúliga stórt fyri okkum, og púra óveruligt, sigur Hans Edward, forsangari í The Dreams.

### Altjóða pallur stendur opin

Hóast einki enn kann avdúkast, so staðfestir ChiefOne, at samráðingar eru við plátufeløg í øðrum londum, og væntandi verða The Dreams at síggja í fleiri av heimsins londum innan árslok.

- Eg kann einki ítøkiligt siga enn, men eg lovi øllum føroyingum, at The Dreams fara at umboða Føroyar kring allan heim, sigur ChiefOne.

The Dreams mugu sigast at vera ímillum teir føroysku bólkarnar, ið eru komnir longst á altjóða palli, og eftir øllum at døma kunnu vit vænta okkum nógv meira frá ungu føroyingunum.

- Mítt endamál er, at føroyska flaggið skal veittra um allan heim saman við The Dreams, sigur ChiefOne.

# Kringvarpsstjórin ikki á veg úr starvinum

**Seinastu tíðina hava leysatíðindi gingið um, at kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen, skal vera á veg út úr Kringvarpinum. Hetta avsannar kringvarpsstjórin**

KRINGVARPIÐ
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Tað hevur seinastu tíðina ljóðað at stjórin í Kringvarp Føroya, Annika Mittún Jacobsen, skal hava tikið avgerð um at fara úr starvi sínum sum kringvarpsstjóri.

Seinasta vikuskifti tóku tveir týðandi persónar í Kringvarpinum seg úr starvinum, nevniliga Allan Dalsgarð, leiðari á Miðladeildini, og Signar í Homrum, ið er lýsingasamskipari í Kringvarp Føroya.

Síðan tá hava leysatíðindi verið um at kringvarpsstjórin, Annika Mittún Jacobsen, eisini skal vera á veg úr starvinum, men sjálv avsannar hon hetta.

Er tað rætt, at tú ert á veg úr starvinum sum kringvarpsstjóri?

- Nei. Tað er tað ikki. Eg trívist væl, og so leingi Kringvarpið verður debatterað, er tað bara gott, sigur Annika Mittún Jacobsen, stjóri í Kringvarp Føroya.

